

# Samkomublaðið fyri desember

# 2015



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## Ein persónligur vitnisburður

***Martin Olsen***

Tí eygu HARRANS skoða um alla jørðina, og Hann letur síggjast, at Hann er sterkur í at hjálpa teimum, sum heilhjartað eru við Honum. 2. Krýn. 16:9

Tá ið eg var smádrongur, vóru stórar vekingar í heimbygd míni og í bygdunum runt Skálafjørðin. Bussar fyltir við ungum og eldri streymaðu til møtini, og vóru hesi árini eitt vælsignilsi í lívi mínum.
Teir, sum bóru orðið fram, vóru kontantir í síni boðan – øll høvdu syndað, og tí var neyðugt at umvenda seg. Jesus sigur "vendið um, tí himmilríkið er komið nær".

Eg kendi sum lítil smádrongur Guðs kall og minnist, at tá vit sum børn spældu, so kendi eg Andan í bróstinum og mátti fara til síðis at biðja og syngja um Jesus.

Tá ið eg var 10 ára gamal, gjørdist pápi mín sjúkur av Parkinson. Tá var hann bert 40 ár.
Tað gjørdi barnaárini tung fyri meg. At síggja hvussu svárt tað var hjá pápa, at hann ikki kundi vinna fyri dagsins uppihald og haraftrat at síggja ta byrði, mamma hevði at uppfostra 10 børn. Almannastova var eingin, men tá var gott at hava Jesus og kunna biðja til hann - ongantíð minnist eg, at hann sveik okkum.

Eg bað nógv fyri, at pápi skuldi verða grøddur. Ikki bleiv pápi grøddur, men hóast tað, so hevði eg eitt stórt upplivilsi.

Tá ið pápi sum 66 ára gamal doyði, stóð eg við høvdalagið hjá honum. Knappliga upplivdi eg eitt vakuum í rúminum, og tað var sum nakað kom og fór upp við vangan á mær. Likam hansara lá har, men andin var farin heim til Hann, sum gav hann. Eg trúgvi, at Jesus unti mær hesa uppliving eftir mangar bønir og sorgir - Guð er góður!

Eg veit ikki, hvar tíðin er farin. Bíblian sigur, at vit eru sum roykur á luftini eina tíð, men sum fánar burtur. Árini eru farin, men at eg gjørdist tann eg eri, er vegna, at eg havi kent Jesus Kristus.

Tað at duga væl og at vera næmur at læra, er ikki øllum meniskjum givið, og so var heldur ikki hjá mær.

Tá ið eg sum ungur maður bygdi grundina til húsini hjá okkum, føldi eg tað, sum eg einki dugdi. Tað var, sum at eg einki hevði fingið við av øllum tí, sum eg hevði lært. Tá ið tað regnaði, so plagdi eg at kroka í einum gomlum seyðahúsi og har rópa til Guð um at duga og skilja. Eg bað Hann um at hjálpa mær at loysa uppgávuna.

Harrin hjálpti, og um eg skuldi vitna um alt, Harrin lærdi og hjálpti mær við gjøgnum árini, so rúmast tað ikki í eini andakt.

Samvitskan er eitt amboð, sum vit hava fingið frá Guði, og hon hevur mangan verið til hjálp, tá ið eg varð freistaður. Samvitskan kann virka órógvandi, tí hon heldur okkum aftur, og er samvitskan ein gáva frá okkara Skapara. Hann nýtir hana til at mynda okkum, og tí er neyðugt at vara væl um samvitskuna. Gera vit ikki tað, so verða vit sum ein bilur við ongum bremsum.

Beiskleiki er eitt ónærisligt amboð, Sátan brúkar. Hann spælir við okkara stoltleika og spælir sær við at niðurbróta vælveru okkara, so vit ikki verða før fyri at hugsa klárt.

Beiskleikarót rennur upp og ger óskil, og mangir verða smittaðir av henni. Mong eru tey, sum doyggja av kreftsjúku, og er beiskleiki at líkna við kreftina. Beiskleiki kann drepa bæði likam og andan í okkum.

Jesus Kristus er hin stóri læknin. Jesus er okkara einasta alternativ - Jesu blóð reinsar frá allari synd, og um syndir okkara eru sum skarlak, skulu tær verða sum hvítasta ull.

# Skrá fyri desember

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 7. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 8. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 9. des. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 12. des. | kl. 20.00: | AWAKE við Lyle Shelton úr Avstralia. Sí meira undir lýsingar |
| Sunnudagur | 13 des. | kl. 16.00: | Barna- og familjujólaveitslan |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 14. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 15. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 16. des. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 19. des. | kl. 20.00: | Jóla-AWAKE :) |
| Sunnudagur | 20. des | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 21. des. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 22. des. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 23. des. | kl. 20.00: | Vit syngja jólini inn |
| Leygardagur | 26. des | kl. 21.00: | Hosukvøld |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 28. des. | kl. 20.00: | Einki bønarmøti |
| Týsdagur | 29. des. | kl. 10.00: | Eingin bønardagur |
| Mikudagur | 30. des. | | Kaféterian er stongd |
| Leygardagur | 2. jan. | | Einki AWAKE |
| Sunnudagur | 3. jan. | kl. 18.00: | Jóla- og nýggjársveitsla. Sí meira undir Lýsingar |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 4. jan. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 5. jan. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 6. jan. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 9. jan. | kl. 20.00: | AWAKE við ungdómsleiðsluni |
| Sunnudagur | 10. jan. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

# Lýsingar

**Spennandi vitjan á AWAKE**
Á Awake leygarkvøldið 12. desember verður spennandi og aktuell vitjan. Avstraliumaðurin Lyle Shelton fer at tala. Hann fer at tosa um, hví vit skulu halda fast við hjúnabandið. Hetta er eitt háaktuelt evni, nú uppskot er til viðgerðar í Løgtinginum um at broyta hjúnabands-lógina. Lyle er stjóri fyri Australian Christian Lobby. Hetta er ein kristin felagsskapur, sum arbeiðir fyri kristnari ávirkan í samfelagnum. Hann er útbúgvin journalistur. Hann hevur verið ungdómspastorur og politikari. Tað er "Ja til hjúnabandið", sum hevur bjóðað honum til Føroyar.

**Vit syngja jólini inn**
Aftur í ár fara vit at syngja jólini inn 23 des. kl. 21.00. Vit fara at hava eina hugnaliga sang-løtu saman við framførslum og nógvum felagssangi.  Í ár fáa vit vitjan av Petur Hans Hansen av Toftum, sum kemur at syngja nakrar sangir fyri okkum. Aftaná hugna vit okkum við einum góðum drekkamunni og holukøkum.
Øll eru vælkomin. Tað er ókeypis atgongd, men vit fara, sum undanfarin ár, at hava eina innsavnan til frama fyri missión.

**Nýggjársveitslan**
Árliga nýggjársveitslan verður í Kelduni sunnukvøldið 3. januar 2016 kl.18.00.
Møguligt er at tilmelda seg á beinleiðis á netinum á keldan.fo.. Eisini ber til at melda seg til á telefon 59 99 06.
Kostnaðurin er 150,- pr. persón og aldursmarkið er 13 ár.
Seinasta freist at tekna seg er sunnukvøldið 20. desember.
Verið hjartaliga vælkomin :)

**Leiðarakveiking**
Farið verður undir at hava leiðarakveiking. Sam Jakobsen kemur at undirvísa. Byrjað verður kl. 18.00 við ábiti og síðan verður farið í lítlasal til undirvísing.
Hesar dagar savnast vit: 6. jan., 17. feb., 16. mars og 13. apríl.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584